## Heldur eyga við Caroll

Enski landsliðsvenjarin í fótbólti, Fabio Capello, hevur gott eyga á Newcastle-framherjanum, Andy Caroll. U21-landsliðsspælarin hevur staðið seg væl í álopinum hjá Newcastle í ár, og Capello heldur hann hava gjørt so stór framstig, at hann kann koma upp á tal til enska landsliðshópin, um aðrir framherjar verða skaddir ella spæla illa. Capello heldur, at Andy Caroll verður ein av framtíðar stjørnunum í enskum fótbólti, skrivar News of the World.



## Taylor missir fýra mánaðir

Newcastle-verjuspælarin, Steven Taylor, fær ikki spælt fótbólt næstu fýra mánaðirnar. Støðan hjá honum er í løtuni so ring, at hann má eta við einum súgvirøri. Orsøkin til hetta er, at hann hevur brotið kjálkabeinið í tveimum støðum eftir bardaga við ein liðfelaga í Newcastle. Steven Taylor og Andy Caroll gjørdu óklárir í viðgerðarrúminum, og tað endaði við, at Taylor fekk álvarsligan skaða í andlitið.

### H71-KÍF 25-32 (11-16):

# Glaðir fyri bronsuna

**KÍF vann stórt á H71, men hóast ikki rakk til finalupláss, eru kollfirðingar væl nøgdir. – Alt skuldi ganga upp í eina hægri eind, skuldi tað eydnast, staðfestir Gert Hansen**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Kollfirðingar gjørdu sítt, so skuldu hini úrslitini havt lagað seg eftir vild, vóru teir klárir at koma í finaluna. Men hóast teir vunnu sannførandi á hoyvíkingum við sjey málum, rakk tað ikki til finaluna, men gav kortini KÍF bronsu.

– Tað er fínasta slag, at vit fáa bronsu, tí hetta var nokk tað, sum tað kundi røkka til hjá okkum, sigur strikuspælarin, Gert Hansen, sum – eins og restin av liðnum – var eitt stórt smíl, tá hann hevði fingið heiðursmerkið um hálsin. Eisini áskoðararnir fagnaðu spælarunum eftir dystin, tí bronsan var kanska meira, enn nakar hevði væntað undan kappingarárinum.

– Hetta er jú eitt super úrslit, so eg eri ótrúliga væl nøgdur. Alt hitt skuldi ganga upp í eina hægri eind, men tað gjørdi tað so ikki. Vit kundu kanska verið komnir eitt lítið sindur longur í ár, men vit gjørdu so alt tað, vit kundu. Næsta ár ætla vit at taka okkum eitt sindur longur fram.

### Aftur at byggja upp

H71 var meistari í fjør, men endar aftast í ár eftir eina sera javna kapping millum tey fimm liðini, sum tað mesta av tíðini kappaðust um at sleppa í finaluna ímóti Neistanum, ið tíðliga fór frá hinum.

– Eg eri ótrúliga skuffaður, tí tað hevur verið so tætt, at øll fyri tað kundu enda aftast. Men tað stendur á stigatalvuni, at vit eru aftast, og tað er ikki gott. Vit máttu bara sanna, at tað er strævið at skula verja eitt meistaraheiti, sigur ein av H71-arunum, Dánjal Tórgarð.

– Hetta er eitt heilt annað lið og soleiðis er tað alla tíðina hjá okkum. Vit blivu føroyameistarar í fjør, men skuldu so byggja eitt nýtt lið upp í ár, og tað verður nokk tað sama næsta ár, tí onkrir av teimum berandi fara niður at lesa. Men vit, sum eru eftir, eru tá eitt ár eldri, og vit skulu nokk klára at vinna nakrar dystir.



Spælararnir hjá KÍF vóru glaðir fyri bronsuheiðursmerkini og gloymdu heldur ikki at takka sínum trúgvu áskoðarum fyri stuðulin
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Kyndil var ynskið

Ingi Olsen er fegin um, at Neistin skal spæla finaluna móti Kyndil.

– Kyndil vann seg í finaluna, og tað hava teir uppiborið. Vit hava ongar trupulleikar við at spæla móti teimum. Vit hava vunnið steypafinaluna móti Kyndil seinastu tvey árini, og vit hava vunnið greitt á teimum í landskappingini í ár, so Kyndil er helst ynskimótstøðan, staðfestir Ingi Olsen, venjari hjá Neistanum.

David Edvardsen, sum var toppskjútti hjá Neistanum í gjár, frøist eisini um mótstøðuliðið.

– Vit eru avgjørt glaðir fyri, at vit skulu spæla móti Kyndil. Vit hava spælt tríggjar sera tættar dystir móti VÍF, men vit hava havt gott tak á Kyndil, sigur David Edvardsen.

uni

### VÍF-Neistin 27-29 (11-14):

# Harald vónbrotin

**Harald Bjørgvin greiddi sín setning sum venjari hjá VÍF, tí hann lyfti vestmenningar úr botnstríðnum. Men framvegis er hann sera harmur, nú hann gevst sum venjari í Vestmanna**



uni@sosialurin.fo

Uni Holm Johannesen

Harald Bjørgvin drálar eina løtu, tí hann hevur torført við at seta orð á kensluna, hann og vestmenningar standa við. VÍF hava júst tapt heimadystin móti Neistanum og sleppur tí ikki í FM-finaluna.

– Eg eri sjálvsagt sera harmur, letur síðan spakuliga úr honum, meðan hann hyggur út á vøllin, har bláu havnarmenninir hálsfevnast.

Talan var um ein sera tættan dyst í Vestmanna. VÍF vann seg brádliga framum eftir hvíldina, hóast Neistin var á odda í stórum løtum av fyrra hálvleiki. Vestmenningar megnaðu ikki at halda fast um leiðsluna, og hóast munurin ongantíð var serliga stórur, rann VÍF bara aftaná, tá gestirnir vunnu seg tvey mál framum miðskeiðis í seinna hálvleiki.

### Greiddi sín setning

VÍF var á aftasta plássinum, tá Harald Bjørgvin loysti Jónleif Sólsker av í venjarasessinum í Vestmanna, men við miðvísum arbeiði eydnaðist honum at lyfta vestmenningar upp á fjórða plássið í landskappingini.

– Tá vit vunnu fýra dystir upp í slag, var mestsum sjálvsagt, at málið broyttist. Vit lógu sera væl fyri í stríðnum um finalupláss. Vit vóru sera nær, men tað eydnaðist ikki, og tí eru vit vónbrotnir, sigur Harald Bjørgvin, sum nú takkar fyri seg sum venjari hjá VÍF á hesum sinni.

– Eg gevi ikki liðnum meira nú, staðfestir Harald Bjørgvin, sum hevur alla orsøk til at reisa seg úr venjarasessinum við røttum ryggi.

VÍF kundi við sigri á heimavølli móti KÍF í farnu viku havt tryggjað sær finaluplássið, men tað eydnaðist ikki.



Finaludreymurin hjá Áka G. Olsen og teimum í VÍF brast, tá teir taptu fyri Neistanum
Mynd: Birgir W. Høgnesen